SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

*– Skulu vit biðja Iran og Sýrialand um hjálp, mugu vit broyta hugsan*

*(amerikanskur ráðgevi)*

# Iran og Sýrialand skulu hjálpa USA úr Irak



*Hetta er gerandismynd í Bagdad og aðrastaðni í Irak*

**Ein nevnd hjá amerikonsku Kongressini heldur, at USA eigur at taka seg úr Irak, og at iranskir og sýriskir hermenn skulu loysa teir amerikonsku hermenninar av**

Frágreiðingin hjá nevndini er ikki almannakunngjørd enn, men nakrir av nevndarlimunum hava avdúkað ein part av innihaldinum fyri bløðunum Los Angeles Times og The New York Sun. Millum annað verður ein av nevndarlimunum endurgivin fyri at siga, at verandi politikkurin í Irak virkar ikki eftir ætlan, og at tað er neyðugt at ganga aðra leið.

Kongressin setti nevndina fyri sjey mánaðum síðani, og George W. Bush, forseti, tók undir við avgerðini. Hann vónaði, at niðurstøðan fór at stuðla krígsførsluni í Irak, men tann veksandi mótstøðan í Irak hevur fingið nevndina at koma við uppskoti um, at USA eigur at leggja á annan bógv.

– Nevndin heldur, at tað finnast aðrir vegir, sigur fyrrverandi uttanríkisráðharrin James Baker, sum er formaður í nevndini.

Sambært The New York Sun mælir nevndin stjórnini til eina stigvísa afturtøku úr Irak. Hermenninir skulu tó ikki flytast til USA, men teir skulu hava støð ymsastaðni nærhendis Irak, so tað skal bera til at senda teir aftur til Irak eftir stuttari tíð, gerst tað neyðugt.

### Iran og Sýrialand

Kongressnevndin er samd við Bush-stjórnini um, at USA eigur framhaldandi at styrkja stjórnina í Bagdad og at fáa uppreistrarmenninar upp í tað politiska lívið. Harumframt kemur nevndin við uppskoti um at draga Iran og Sýrialand upp í arbeiðið at steðga bardøgunum í Irak.

– Sjálvur havi eg altíð hildið, at tað er rætt at tosa við sínar fíggindar, sigur James Baker. Hann vísir á, at hvørki iranar ella sýrialendingar hava áhuga í óstøðugum viðurskiftum í Irak, og tí er tað ikki óhugsandi, at tey eru sinnað at virka fyri at fáa enda á ófriðinum har.

Fyrrverandi amerikanski sendimaðurin í Afganistan James Dobbin hevur verið ráðgevi hjá kongressnevndini, og hann tekur undir við hugskotinum at geva Iran og Sýrialandi ein virknan lut í Irak. Men ein tílík áheitan úr Washington fer at seta krøv, sigur hann.

– So noyðast vit at sleppa tosinum um demokrati og heldur leggja dent á støðug viðurskifti. Vit noyðast eisini at gevast við at tosa um stjórnarskifti, tí vit kunnu ikki tosa um at styrkja Irak og virka fyri broytingum í Iran og Sýrialandi samstundis, sigur James Dobbin.

### Blóðugt vikuskifti

Seinasta vikuskiftið var eitt tað mest blóðuga í Irak síðani innrásina við fleiri álopum og bumbuspreingingum. Minst 91 fólk lógu eftirá. Í Bagdad byrjaði harðskapurin, tá 17 shiamuslimskir menn vórðu funnir myrdir fríggjadagin. Stutt aftaná sóust shiamuslimsk álopslið í svørtum klæðum ymsastaðni í Bagdad. Tey avbyrgdu fleiri vegir rundan um tann sunnimuslimska býarpartin. Sambært myndugleikunum vórðu fleiri sunnumuslimskir menn og unglingar tiknir og skotnir, og líkini lógu og sløgdust í gøtunum.

Samanbrestir vóru eisini millum kurdar og sunnimuslimar har norðuri í landinum, og minst 13 fólk lótu lív.

## STUTT SAGT

### Fleiri lond kunnu

Altjóða kjarnorkustovnurin IAEA ávarar nú um, at fleiri lond fara at fáa sær kjarnorkuvápn í komandi árum, verða stig ikki tikin til at forða londunum í at fáa ta neyðugu tøknina. IAEA sigur, at millum 20 og 30 lond hava orku til at fáa sær kjarnorkuvápn, og teirra millum eru Brasil, Suðurkorea, Japan, Saudiarabia og Egyptaland. Einastu lond, sum hava slept sínum ætlanum á økinum, eru Libya og Suðuafrika.

### Olmert fekk krakk

Ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, fekk sum vátan vøtt frammaná, tá hann í gjár beyð libanska starvsbróðuri sínum til borðs at samráðast um eina friðaravtalu millum londini. Fuad Saniora svaraði stutt, at tað kemur ikki upp á tal. Tvørturímóti skal hann hava sagt, at Libanon verður tað seinasta arabiska landið, sum ger friðaravtalu við Ísrael. Í summar bumbaði Ísrael Libanon í sor, men Olmert sigur, at nú er tíð at tosa um frið.

### Vil ikki hava Chavez

Amerikanska stjórnin stríðist av øllum alvi ímóti, at Venesuela skal fáa sæti í trygdarráðnum hjá ST, tí hon vil ikki, at venesuelski forsetin, Hugo Chavez, skal fáa ein talarastól í trygdarráðnum. Eitt latínamerikanskt land skal veljast í ráðið, og dysturin stendur millum Venesuela og Guatemala. USA og tey miðamerikonsku londini styðja Guatemala, meðan tey suðuramerikonsku styðja Venesuela. Avgerðin kann fella í dag.

# Myrdi foreldrini og systrarnar

**Løgreglan veit ikki, hví tann 22 ára gamli Shawn Bentler myrdi foreldur síni og tríggjar yngri systrar**

Ákæruvaldið í amerikanska statinum Iowa hevur ákært Shawn Bentler fyri at hava skotið foreldrini og systrarnar. Líkini av foreldrunum, sum vóru 53 og 47 ára gomul, og systrunum, sum vóru 17, 15 og 14, vórðu funnin í heimi teirra nærhendis býnum Bonaparte, skrivar AP.

Sambært einum blaði í Iowa ringdi tann yngsta systirin til løgregluna leygarmorgunin og greiddi frá, at bróðurin var komin til hús, og at hann ætlaði sær at gera okkurt. Á bandupptøkuni, sum løgreglan hevur av telefonsamrøðuni, hoyrist eitt skot. Síðani verður telefonin avbrotin. Á løgreglustøðini sæst, at mamman ringdi eisini til løgregluna, men at eingin svaraði henni.

Løgreglan veit ikki, hví tann 22 ára gamli maðurin myrdi foreldrini og systrarnar. Bentler-húskið var rættiliga múgvandi og átti fleiri fyritøkur, skrivar AP.